# B36 raknaði við




**GÓÐUR DYSTUR**

*Leikferðin var høg, og stundum var spælið heilt gott í fyrru hálvfinaluni millum B36 og EB/Streym, har hvita havnarfelagið átti munin*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

**LØGMANSSTEYPIÐ** B36 var aftanfyri 1-0 í hálvleikinum, men vendi í seinna hálvleiki dystinum til ein 2-1 sigur

Tróndur Arge

– Tað sum ger eitt lið til eitt gott lið er at tað stendur saman og stríðist víðari. Eg helt ikki teir vóru so dominerandi í fyrra hálvleiki, men vit góvu teimum eitt mál. Vit svaraðu væl aftur í seinna hálvleiki og eg haldi tað sigurin var uppiborðin, sigur Jákup á Borg eftir dystin.

Tað var mjørkakent og váttligt í Gundadali, tá liðini komu á vøllin. Váti vøllurin gjørdi at spælið gekk skjótt fyri seg og til tíðir so skjótt at menn kláraðu ikki at fylgja við. Onkuntíð fyrr hevur áskoðaratalið verið hægri til eina hálvfinalu í steypakappingini enn tað var í gjár.

Tað sá einki út í fyrra hálvleiki hjá B36, tá B36 leikarin, Høgni Eysturoy, var óheppin og spældi EB/Streyma framherjan, Arnbjørn Hansen, púra leysan. Arnbjørn var tryggur og krepputosið í B36 kundi byrja, nú tað hevur gingið so illa í hond í seinastuni. Tað B36 liðið sum fór til hálvleiks kom ongantíð út aftur. Tað gjørdi hinvegin tað B36 liðið, ið millum annað koppaði HB í steypakappingini og vann tríggjar teir fyrstu dystirnar í landskappingini.

Seinni hálvleikur var bara átta minuttir gamal, tá fyrrverandi EB/Streyma leikarin, Bárður Olsen, smekkaði til uttanfyri brotssteigin og javnaði fyri B36. Tíggju minuttir seinni legði Hjalgrím Elttør B36 á odda 2-1.




*Frøðin var stór á bæði leikarum og viðhaldsfólkið*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

– Taktikkurin var at liggja tættir í verjuni og so spæla uppá skjótálop. Vit vóru bara ikki tættir nokk í teimum í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki komu vit so út aftur við tveimum framherjum og tað riggaði væl betri, sigur Jákup á Borg.

Í seinna hálvleiki hevði B36 onkrar góðar møguleikar at økja um leiðsluna, men heimaliðið tók ikki av. Sundalagsmenn høvdu eisini onkrar royndir á B36 málið, men tær góvu onki úrslit.

– Eg eri bara sera fegin um at vit hava vunnið hendan dystin, havandi í huga gongdina seinastuni. Vit hava nú vunnið fyrra dystin av tveimum, og tað skal nógv til á Streymnesi áðrenn vit koma í finaluna, sigur Jákup.

Tað var annars nógv ferð á dystinum, sum til tíðar var væl leiktur við málmøguleikum í báðum endum. Tað var eisini dramatikkur í luftini upp til fleiri ferðir, tí menn góvu seg alt teir áttu. Tíverri kostaði tað Símun Joesen hjá B36 ein skaða. Eisini var tað harmuligt at síggja Inga Højsted lata seg skifta út við skaða, stutt eftir at hann var komin inn.

– Tað var sera erguligt hjá teimum, men Herbert í Lon er á veg aftur og vit hava sterkar menn at seta í staðin. Tað hevur verið ein tung gongd í seinastuni, men vónandi er hetta vendin sum fær okkum í gongd aftur, sigur Jákup á Borg at enda.

## Í seinna hálvleiki komu vit so út aftur við tveimum framherjum og tað riggaði væl betri

JÁKUP Á BORG

Líkamikið hvør av hesum báðum liðnum kemur í finaluna, so vístu bæði í gjár, at tey hava uppiborð annað plássið í steypafinaluni.

trondur@sosialurin.fo